## Listastevna Føroya 2004

**Einar Ørn úr Sugar Cubes í Gallerí Riberhúsi og á Vertshúsinum**

Í sambandi við Smekkleysa-framsýningina í Riberhúsi í Fuglafirði, sum letur upp fríggjadagin kl. 16, kemur bólkurin Ghostigital við Einar Ørn á odda úr Íslandi til Føroya. Ghostigital fer at spæla í Riberhúsi leygardagin 7. august seinna-



partin og á Vertshúsinum kl. 22 sama kvøld.

**Skráin í Riberhúsi í Fuglafirði:**



Fríggjadagin 6. august kl. 16:
Framsýningin letur upp:
Ólafur Engilbrechtsson greiðir frá upprunanum til Smekkleysu

Leygardagin 7. august kl. 17:
1. Curver:Bad Taste DJ Mix
2. Úlfhildur Dagsdóttir bókmentafrøðingur heldur fyrilestur og víst verður á sjónbandi um Bjørk, Sugarcubes, Sigur Rós og fleiri
3. Carl Jóhan Jensen lesur yrkingar
4. Bragi Ólafson úr Íslandi lesur yrkingar
5. Oddfríður Rasmussen lesur yrkingar
6. Konsert Ghostigital

# Johanna og Norðlýsið hittast í Stóru Dímun





*Í morgin, leygardagin, fara bæði Jóhanna og Norðlýsið til Dímunar við ferðfólki - tær fara ávikavist úr Havn og úr Vági*

**Streymviðurskiftini í morgin, leygardagin, eru tey bestu at gera ein túr í Stóru Dímun**

ÚTFERÐ
*Tíðindaskriv*

Í morgin, leygardagin, kl 10 fer Norðlýsið av Bursatanga, meðan Johanna fer av Vági kl. 12.30. Bæði skipini vænta at verða undir Dímun um 14 tíðina. Norðlýsið og Johanna vænta at verða aftur við kai ávikavist í Vági og í Havn um 20 tíðina á kvøldið.

Fólki verður sett í land á Stóru Dímun við gummibáti. So verður gingið upp á Dímun við staðkendum fólki. Ætlanin er at verða uppi á oynni eini 3 - 4 tímar.

Hetta er fyrsti túrur hjá Johannu í Dímun í nógv ár. Tó so - í 50 og 60 árunum bleiv Johanna mangan brúkt til at føra seyð úr Dímun, siga tey av Kunningarstovuni í Vági.

### Gott at hava við

Heit og góð klæði, góðar skógvar ella styvlar, matpakka og ein heitan drekkamunn. Hevur tú kikara við tær, gerst túrurin óiva meiri áhugaverdur. Best er um viðføri verður borið í ryggsekki, eftirsum gangast skal upp á oynna.

### Tilmelding og prísur

Eftirsum tað er munur á siglingartíðini hjá Norðlýsinum og Johannu er eisini prísmunur.

Við Johannu kostar túrurin í Stóru Dímun er 250 krónur fyri vaksin, og 100 krónur fyri børn undir 14 ár.

Við Norðlýsinum kostar túrurin 350 krónur fyri vaksin og 175 krónur fyri børn.

Bindandi tilmelding til túrarnar skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00. Skiparin á Norðlýsinum hevur tlf. 218520.

# Fólkafundur á Skarðinum sunnudagin

**Árligi fundurin á Skarðinum verður - um viðrar - sunnudagin, 8. august. Farið verður til gongu niðan á Skarðið frá Kunningarstovuni í Fuglafirði kl.14.00**

FÓLKAFUNDUR
*Tíðindaskriv*



*Frá fólkafundi á Skarðinum í septemer í 1999. Frits Johannesen heldur røðu*

»Fjallarøðuna« fer Napoleon Joensen, sum eisini man eiga nøkur spor um Skarðið, at halda. Annars fara tey at hugna sær eins og hini árini við felagssangi. Sangheftir verða býtt út av fyriskiparunum.

Í ár eru liðin júst 10 ár, síðan Fuglafjarðar Fornminnisfelag fór undir hesar fundir í samband við, at ungdómar úr Fuglafirði, vegleiddir av teim eldru, umvældu varðarnar. Tískil fer Uni Næs, prestur, eisini at seta dám á løtuna við nøkrum orðum uppi við ovasta varðan, har siður er at leggja tríggjar steinar í varðan í navni Faðirsins, Sonarins og Heilga Andans.

Tiltakið er ókeypis og øll eru vælkomin, sigur Fuglafjarðar Fornminnisfelag.





*Sum er kunnu flogfør við upp til 130 ferðafólk lenda í Vágum. Men verður flogbreytin longd til 1.450 metrar vil hetta gera tað munandi lættari hjá tílíkum flogførum at lenda, sigur Hans Hansen*

Hans Hansen:

# Í Vágum er ikki so galið

**– Tað er ein fíggjarligur spurningur, hvørt flogvøllurin í Vágum skal leingjast og hvussu nógv. Tað ger einki fyri trygdina, um vøllurin verður longdur heilt út á 1.800 metrar, sigur Hans Hansen, flogskipari**

FLOGVØLLURIN
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Royndasti flogskiparin á Føroya leiðini hjá Atlantic Airways, Hans Hansen, heldur als ikki, at tað er so trupult at flúgva til Vágarnar. Hann hevur stýrt British Aerospace flogførunum hjá Atlantic Airways síðani felagið byrjaði at flúgva til Føroya í 1988.

Hann heldur, at tað ganga alt ov nógvar ósannar søgur um, hvussu torført tað er at flúgva til og úr Vágunum.

– Tað er ikki so galið av flúgva til Føroya. Vit hava eitt reglusemi, sum er oman fyri 98%, og tað er tað sama sum aðrastaðni, sigur Hans Hansen, sum heldur, at tað tær nógvu søgurnar um vánalig floglíkindi ikki eru annað enn leysasøgur.

- Tað eru nakrir fáir túrar um árið, har tað er ófriðarligt at flúgva við flogvøllin, sigur Hans Hansen

### Fjøllini no problem

Flogbreytin í Vágum 1.250 metrar. Tosað verður um at leingja vøllin til 1.450 metrar. Somuleiðis verður tosað um at leingja heilt út á 1.800 metrar, sum riggar betri við altjóða normar.

Hans Hansen sigur, at verður flogvøllurin longdur til 1.450, so vil hetta geva heilt nógvar nýggjar møguleikar.

– Sum er kunnu flogfør við upp til 130 ferðafólk lenda í Vágum. Men verður flogbreytin longd til 1.450 metrar vil hetta gera tað munandi lættari hjá tílíkum flogførum at lenda, sigur Hans Hansen.

Hann heldur ikki, at tað er neyðugt at miðja ímóti at skapa karmar fyri so nógv størri flogførum enn 130 fólkum í Vágum.

Tað hevur eisini verið uppi og vent, at tað ikki er forsvarligt at leingja flogvøllin í Vágum til átjanhundrað metrar. Tað hevur serliga verið sipað til, at verður vøllurin longdur til so mikið, so verður komið tætt at fjøllunum. Men fyri trygdina og flogtekniskt er tað eingin trupulleiki



*Hans Hansen heldur ikki, at møguleikarnir at flúgva í Vágum eru so vánaligir, sum fólk hava lyndi at gera teir til*

um so er, at flogvøllurin verður longdur til átjanhundrað metrar.

– Tað hevur ongan týdning, um breytin verður longd tættari at fjøllunum flogtekniskt. Tað ber væl til at lenda, sigur Hans Hansen.

Somu áskoðan hevur Rúni Højgaard, flogskipari við Maersk eisini. Hann dugir ikki at síggja nakran trupulleika í, at vøllurin verður longdur til átjanhundrað metrar, um hann flogbreytin verður longd móti Leitisvatni.

– Ein leingjan upp á 1.450 metrar vildi eisini givið nógv fleiri møguleikar, sigur Rúni Højgaard.

### 130 milliónir

Royndi flogskiparin Hans Hansen sigur, at tað er neyðugt at vera realistiskur, tí leingjan av flogvøllum er sera kostnaðarmikið, og ein nýggjur flogvøllur er enn kostnaðarmiklar, hóast tað hevði verið gott at havt fleiri flogvøllir.

– Tað er ein fíggjarligur spurningur, hvørt flogvøllurin í Vágum skal leingjast og hvussu nógv. Tað ger einki fyri trygdina, um vøllurin verður longdur heilt út á 1.800 metrar, sigur Hans Hansen.

Kostnaðurin fyri at leingja út á 1.450 metrar verður mettur at kosta 130 milliónir. Hetta upplýsir Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri í Vágum. Ætlanin at leingja upp til 1.800 metrar er leysliga mett til at kosta 220 milliónir, men tað hugskotið frá 1988 er ikki gjøgnumarbeitt og ongar tekniskar kanningar fyriliggja.

## Fráferðir fækka

**Flogvallarstjóri og flogskipari eru samdir um, at ein nógv longri flogvøllur kann minka um fráferðirnar**

FLOGVØLLUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Verður flogbreytin í Vágum longd heilt upp í 1.800 metrar loyvir hetta munandi størri flogførum at flúgva til Føroya. Flogskiparin Hans Hansen heldur, at tað er nóg mikið at fáa flogfør til eini 130 fólk at flúgva til Føroya.

– Tað er nóg mikið við 130 fólkum. Gerast flogførini enn størri, so fer hetta at merkja færri fráferðir, og tað gongur í síðsta enda útyvir tænastustøðið, sigur Hans Hansen.

Og flogvallarstjórin í Vágum, Finnbogi Niclasen, er samdur við flogskiparanum. Hann grundar millum annað síni sjónarmið á, at flogvøllurin í Aberdeen var longdur til at taka størri flogfør enn 130 fólk, og hetta gjørdi, at tað komu munandi færri flogfør.

Spurdur, um ein longd flogbreyt ikki hevði givið betri møguleikar fyri, at eitt nú tey væl kendu "low-cost" feløgini fara at flúgva til Føroya, sigur Finnbogi, at hann loyvir seg at ivast í, um tílík feløg hava tann stóra áhugan fyri Føroyum.

– Tað ferðast eini 165.000 ferðafólk um flogvøllin. Hetta tal veksur spakuliga, um eingin samfelagskreppa stingur seg upp. Føroyar eru ein ógvuliga avmarkaður marknaður, sigur Finnbogi Niclasen.

Hóast føroyingar ikki eru nógvir, so eru føroyingar raskir at ferðast loftvegis. Finnbogi Niclasen heldur fyri, at føroyingar mugu næstan eiga heimsmeti í flestum ferðum fyri hvønn íbúgva.

# Tamt orðaskifti í tinginum

**Løgtingsformaðurin heldur, at orðaskiftið um ólavsøkurøðu løgmans var eitt tað tamasta í fleiri ár**

ÒLAVSØKURØÐA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tingið nýtti í ár ikki meira enn tveir dagar at viðgera ólavsøkurøðu løgmans. Vanliga plagar viðgerðin at taka minst tríggjar dagar, men so var ikki í ár. Viðgerðin var sett á fyribils skránni fyri hósdagin, men fiskidagarnir sluppu at standa einsamallir á skránni. Viðgerðin endaði mikukvøldið á leið klokkan átta á kvøldi. Nýggja samgongan yvirlivdi væl og virðiliga sína fyrstu styrkisroynd av hesum slag.

Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, heldur kortini ikki, at serliga nógv minni tíð varð nýtt í ár í mun til undanfarin ár.

– Vit byrjaðu stundisliga klokkan níggju hvønn morgun og arbeiddu út á kvøldið. Tískil hevur tað ikki verið nýtt so nógv minni tíð í ár, sigur Edmund Joensen.

Hann heldur, at orðaskiftið í ár hevur verið rættiliga tamt, og tað hevur verið lítil dramatikkur at hóma.

Løgtingsformaðurin metir, at tað serliga hava verið sjálvstýris- og búskaparmál, sum hava sett dám á kjakið í tinginum. Og soleiðis plagar eisini at vera, sigur Edmund Joensen.

Løgtingið fer til 18. august at viðgera fiskidagarnar. Einki annað mál er á skránni til 18., tá ið fiskidagarnir skulu samtykjast. Fyrsta viðgerð av fiskidøgunum verður seinnapartin.